# Ránið

Tað var kolandi stormur, regnið skolaði niður í tí myrku náttini. Vindurin kom vestan frá. Trøini vaggaðu harðliga aftur og fram, og tey óhugnaligu ýlini frá tokulúrinum ljóðaðu um allan býin. Ikki eitt menniskja sást í býnum, og tó, inni í plantasjuni hoyrdust kviklig fótafet og tivan, sum um onkur rann. So bleiv kvirt, onki hoyrdist eina góða løtu, men so fór onkur aftur at renna, tað var, sum um onkur rann fyri lívinum.

Vekjarin ringdi. Klára vaknaði, lá og vendi og remdi sær í songini. Mátti heldur fara upp, skúlatímin byrjaði um góðan tíma. Hon fór upp, læt seg í klæðini, fór síðani niðurundir. Klára hoyrdi mammuna stákast úti í køkinum, tónleikurin úr útvarpinum kom streymandi móti henni.
”Góðan morgun mamma”, Klára fór inn í køkin og settist við morgunmatarborðið. ”Góðan morgun, góða, nú hvussu hevur tú sovið?” Mammam vendi sær móti henni. ”Jú, ikki so galið”. Klára hugdi at borðinum, og sum altið hevði mammam borðreitt við alskyns morgunfrískum morgunmati.
”Útvarp Føroya 12. mars kl er 07.00 góðan morgun. Tíðindi: Í nátt hevur verið innbrot í okkara størsta handilsmiðdepli her í býnum. Ein vaktarmaður er skotin, hann liggur undir skurði úti á Landsjúkrahúsinum, støða hansara er kritisk. Brotsmenninir hava brotið seg inn á handilsmiðdepilin og eru slopnir inn í pengaskápið har. Teir hava tikið umleið 450.000 túsund krónur og eru sloppnir til rýmingar. Løgreglan stendur í løtuni á púra berum. Vit hava hesi boðini frá løgregluni, at fólk skulu ansa sær, tí her er talan um sera vandamiklar brotsmenn, ið bera vápn”. Mamman hugdi at Kláru. ”Heldur tú ikki at tað er frægast, at tú verður heima í dag, góða?” ”Nei mamma, tað tími eg ikki. Hasir brotsmenninir munnu langtsíðani vera rýmdir úr býnum.”

Klára reistist frá borðinum, fór út á baðiverilsið. Meðan hon stóð og bustaði tenninar, hugsaði hon um ránið. Hvør mundi tað vera, sum hevði gjørt hatta brotsverkið? Mundi tað vera nakar, hon kendi? Eitt rán, ein maður var skotin, tað var ógvuligani álvarsligt. Men hon kundi farið og sneytað uttan fyri handilsmiðdepilin og vitað, um hon sá nakað óvanligt. ”Alt í lagi mamma, vit síggjast seinnapartin.” ”Alt í lagi góða, og ger nú onki býtt. Tá okkurt var hent her í býnum, var Klára altíð til reiðar at blanda seg uppí.

Mamman hugsaði um kvøldið frammanundan. Klára hevði verið heima, gjørt skúlaarbeiðið og var farin tíðliga til songar. Sjálv hevði hon verið inni alt kvøldið, men hevði havt vitjan av Hans. Hann mátti tó avstað tíðliga, tí hann segði, at hann hevði eina avtalu við onkran niðri í býnum. Hann vildi ikki siga meira um hetta og fór avstað. Nei, eg má heldur fara at ringja til hansara og vita, um alt gekk, sum tað skuldi, hugsaði mamman við sær sjálvari. Mamman reistist og fór yvir til telefonina.

Klára fór beina leið í skúlan. Vindurin, sum hevði leikað í um náttina, hevði lagt seg. Tað regnaði ikki longur. Klára føldi tann mjúka vindin taka í hárið. Sólin hevði hug at koma fram, tað var lýtt í morgun. Hettar fór helst at gerast ein góðveðursdagur. Komin í skúlagarðin, sá hon, at tey flestu børnini stóðu og tosaðu um, hvat var hent kvøldið fyri. Hon hugdi rundan um seg, hvar var Emil? Hann plagdi altíð at standa og bíða eftir henni við skúlaportrið. Klára gekk móti skúlanum, hon hoyrdi nógv prát rundan um seg. Hon fór innar í skúlan. Onkustaðni í tí fjara, inni í skúlanum, ringdi ein fartelefon. Tað vóru fá børn komin inn í skúla-gongina. Tað var heldur løgið, at Emil ikki var komin í skúla, hugsaði hon. Hann var altíð ein av fyrstu børnunum, sum møttu upp. Hann var besti vinmaður hennara, og øll tey 10 árini, tey høvdu gingið í skúla, høvdu tey antin fylgst í skúla, ella hevði Emil staðið við skúlaportrið og bíðað eftir henni. “Nei, nei, alt gekk upp á stás í gjár, tað var onki

torført.“ Klára steðgaði, hvat var hatta? “Hvar eg havi gjørt við teir? Nei, tað kann eg ikki bara soleiðis siga beint nú.” Hon hugdi rundan um seg, hvør var hatta, sum tosaði? Hon skundaði sær rundan um hjørnið. Júst sum hon kom undan hjørninum, klamsaði ein hurð aftur. Hurðin inn til læraraverilsið.

Endiliga vóru tímarnir lidnir. Klára reistist og legði bøkurnar í taskuna. Hon mátti heldur fara heim til Emil og vita, hvat var galið. Emil var heldur ikki møttur upp í skúlanum, og hon hevði onki hoyrt frá honum allan dagin. Hon hevði bert ein klavertíma eftir, og so var hon liðug fyri í dag. Klára gekk yvir til tónleikastovuna, hon sat og bíðaði eina góða løtu. Ongin Hr. Joensen møtti upp. Klára fór yvir til lærarakontórið, í tí hon letur hurðuna upp, hoyrir hon kontórdamuna siga, ” Ja eg havi hoyrt, men verð róligur, vit skulu klára hetta í felag.” Klára steðgaði í hurðini, kontórdaman hugdi upp. Hon var skjót at leggja hornið á. ”Ja, hvat kann eg hjálpa tær við?” spurdi kontórdaman” “Eg vildi bara spyrja um Hans, klaverlærarin, ikki var í skúla í dag?” Kontórdaman var blivin eitt sindur reyð um kjálkarnar. ”Hmm tað var heldur undarligt. Hann hevur verið her, men mátti fara eitt ørindi fyrrapartin, hann segði tó, at hann skuldi vera aftur nakað skjótt. Bíða við, eg skal fara og ringja til hansara.” Hon ringdi, men ongin tók telefonina. ”Nei góða, far tú bara heim, tað er helst okkurt komið fyri hjá honum, síðani hann ikki er komin aftur.” ”Okay, takk fyri hjálpina.” Klára fór avstað. Alt var eitt sindur løgið, ránið í gjár, samrøðan, ið hon hevði hoyrt eitt sindur av í morgun og Hans, klaverlærarin, sum ikki var møttur upp seinnapartin. Emil, ið heldur ikki var møttur upp í morgun, og hon hevði onki hoyrt frá honum á allan dag. Hon kendi á sær, at tað var okkurt, ið ikki ruggaði rætt.

Klára fór til Emil, men ongin var inni. Bara onki var hent honum. Hon hevði roynt og ringt á fartelefonina hjá honum, men onki samband var. Hvat nú? Ná, men eg haldi, eg fari yvir til handilsmiðdepilin at vita,

hvussu stendur til har, hugsaði hon. Komin hagar, var alt sperrað av. Har stóðu nógv fólk og hugdu at. Nógv løgreglufólk gingu innanfyri avsperringarnar. Klára sá onkra, ið hon kendi. ”Hey, nú hvussu stendur til?” Karin vendi sær móti henni. ”Hevur tú ikki hoyrt? Vaktarmaðurin, sum bleiv skotin í gjár, doyði fyrrapartin” ”Nei, tað meinar tú ikki!” Klára kendi seg illa til passar, tað var ræðuligt, nú var tað eisini talan um morð. Hon hevði ongan hug at standa har longur. Nú var eisini vorðið seint. Tað var farið at skýma, so tað mátti vera frægast at fara heim. Skjótasti vegur var at fara gjøgnum plantasjuna. Tað tók bara einar 10 minuttir, so var hon heima. Komin væl áleiðis inn í plantasjuna, var tað blivið heilt myrkt. Trøini vóru so høg og tøtt. Klára hoyrdi, hvussu vindurin aftur tók í trætopparnar, tað var eisini kølið nú. Knappliga hoyrdi Klára okkurt. Hon steðgaði á, hvat var hatta? Hon hoyrdi onkran tosa saman. Røddirnar komu nærri. Á, hvat skal eg gera? Hugsaði Klára heldur bangin. Klára hugdi rundan um seg, hon stillaði seg aftan fyri eitt træ. Nú vóru røddirnar beint við, hon hoyrdi tvey fólk tosa saman um pengar og um vaktarmannin. Klára kendi á sær, hvussu sveittin rann niður eftir rygginum. Hon tordi ikki at hyggja eftir, hvør tað var, sum stóð og tosaði saman, men hon helt, at onnur røddin ljóðaði kend. Nú fóru tey aftur til gongu, røddirnar kámaðust. Tað lætnaði fyri hjartanum, men knappliga varnaðist hon, at onkur stóð aftanfyri seg. Hon snaraði sær á og hugdi beint inn í eini myrk eygu. So bleiv alt svart.

”Klára, Klára vakna.” Klára læt eyguni upp, hon hugdi beint upp í andlitið á Emil. Hann legði hondina á munnin á henni og teskaði. ”Verð friðarlig, tey eru ikki komin langt enn.” Hann setti seg við lið hennara. ”Hvar hevur tú verið, Emil? Eg havi leitað eftir tær, og tú møtti ikki upp í skúlanum í dag, og hvat gert tú her?” ”Klára, verð friðalig, tey koma aftur henda vegin.” Klára hoyrdi, at røddirnar nærkaðust aftur, hon tók í hondina á Emil. ”Vit eru noydd til at fara av landinum sum skjótast. Eg

haldi, at handan Klára hoyrdi, tá ið eg tosaði við teg í telefonini.” Klára visti nú, hvør tað var, ið tosaði. Tað var kontórdaman. Kontórdaman, sum altíð var so fitt og hjálpsom, hvussu ólukkan kundi hon hava verið atvoldin til hendan ræðuleikan? Klára reistist, hon føldi, hvussu óð hon var. ”Ja, tað er sikkurt best at vit beina fyri Kláru. Eg kenni mammu hennara. Eg kann fara heim til teirra og gera av við hana, aftaná tær eru farnar í song. So kunnu vit sleppa okkum til rýmingar seinni í kvøld.” ”Ja tað er óivað frægast Hans. Ring tú heim til mammu hennara.” Klára var púra forfard, um tað hon hoyrdi. Hon hugdi í eyguni á Emil. Hann risti bara við høvdinum, ”Verð bara friðarlig,” teskaði hann. Tey bæði brotsmannafólkini vóru aftur farin til gongu, løtu seinni hoyrdu tey ein bil fara í gongd. ”Klára, tú skundar tær heim, eg renni yvir á løgreglustøðina. Tá ið tú kemur heim, letur tú sum um tú onki veitst av nøkrum.“

Emil fór rennandi avstað. Klára skundaði sær heim, hon var bangin um mammuna. Komin í túnið, sá hon bilin hjá Hans. Hon føldi, hvussu spenningurin breiddi seg í øllum kroppinum. Komin innar í gongina, ristist hon um allan kroppin. Hon hoyrdi røddirnar á mammuni og Hans. ”Klára er tað tú, sum er komin?” Mamman kom út í gongina, ”kom og fá tær eta, nátturin stendur á borðinum.” Klára fór inni í køkin, Hans sat við borðið. Hann hugdi í eyguni á Kláru. ”Nú Klára hvar hevur tú verið?” Ja, hevði tú bara vitað, hugsaði Klára. ”Nei eg havi bara verið úti.” Klára setti seg við borðið. ”Ja men Klára, hví ert tú so skitin um klæðini? Hevur tú nú gingið einsamøll í plantasjuni. Tú veitst væl, at tað dámar mær ikki, nú tað er blivið myrkt.” Hans hugdi upp, hann reistist frá borðinum. ”Hevur tú verið í plantasjuni, Klára.” Klára fekk ikki svarað, tað var sum um orðini stóðu føst í hálsinum á henni. ”Svara Klára.” Hans rópti, eyguni á honum vóru myrk og óhugnalig. ”Hvat í tramin feilar tær Hans.” Mamman stóð hjá Kláru, hon sá óð út. Hans tók ein revolvara úr jakka-lummanum. Mamman skríggjaði. ”Halt kjaft, kvinna, og setið tykkum

báðar niður.” ”Nei, Hans, tú ætlar at drepa okkum, hví gert tú tað ikki bara beinanvegin?” Klára rópti, hon kendi vreiðina í sær. Úthurðin brast upp og kontórdaman kom rennandi inn. ”Ger nú av við tær og lat okkum sleppa okkum burtur.” Hon hevði eisini ein revolvara í hondini. “Ja bíða, eg má líka skrúva ljóðdemparan á.“ Hann gjørdi skjótt av, so stóð hann aftur og siktaði eftir teimum. Fingurin á honum spentist um avtrekkjaran. Tað var tøgn, tað sortnaði fyri eygunum á Kláru, hon tók í hondina á mammuni. Hon føldi tárini renna oman eftir kjálkunum.......

Brádliga hoyrdist ein brestur. Eyguni á Hans sóust stór út, hann hugdi at mammuni, blóðið rann úr munninum á honum. Hann small deyður niður. Kontórdaman vendi sær móti teimum. ”Farvæl tit báðar.” Hon flenti ein óhugnaligan látur. Hurðin brast upp og inn komu fult av løgreglu-monnum. Tað hoyrdist eitt skot og kontórdaman lá á gólvinum. Emil kom rennandi yvir til Kláru, hann tók um hana. ”Er tað hent tær nakað?” Klára risti við høvdinum. ”Á Emil, tit komu í síðstu løtu, tað mundi enda galið.”

*Fríða við Streym*

*9. flokkur*

*Felagsskúlin á Oyrarbakka*